## EG MEINI TAÐ

# Hvør velur, um mamma skal arbeiða úti ella heima?

*Elin Henriksen, leiðari á Barnagarðinum á Velbastað*

At fólk sjálv velja so nógv sum gjørligt viðvíkjandi sínum egnu lívskorum er eitt nútíðar krav. Men ikki tykist, sum allir føroyskir politikkarar hava skilt hetta. Enn eru dømi um, at teir við lóggeving velja fyri fólk. Geva enntá ymsum samfelagsbólkum ymsar valmøguleikar. Tað tykist mær lítið demokratiskt.

Eitt, sum undrar meg, er, at stuðul til barnaansing bert verður latin teimum, sum hava børn í dagstovni ella dagrøkt. Lat okkum taka eitt dømi, sum vit nevna familjuna Hansen. Hon hevur valt at hava børn síni á stovni; eitt barn í barnagarði og eitt í vøggustovu. Almenni stuðulin til familjuna Hansen er einar 80.000 kr. um árið fyri barnaansing. Hitt dømið nevna vit familjuna Joensen. Har eru eisini 2 børn; og hon hevur valt, at mamman er heima hjá børnunum. Tað fáa tey ikki eitt oyra í almennum studningi fyri.

Men nú er so ein nýggj lóg komin. Nú kann familjan Joensen fáa stuðul til, at mamman er heima, men har eru tvær treytir, sum skulu verða uppfyltar: 1) Harra og frú Joensen eru gift. 2) Harra Joensen hevur eina høga inntøku.

At vera heima hjá børnunum er framvegis eingin valmøguleiki hjá einsamøllum uppihaldarum og fólki við lágari inntøku. Heldur ikki er at fara aftur til arbeiðis nakar valmøguleiki hjá teimum, sum einki pláss fáa á dagstovni, hóast tey gjalda sama skatt sum tey, ið fáa pláss.

Vit kunnu eisini royna at síggja tað frá sjónarmiðinum hjá barninum. Vit kunnu hugsa okkum eitt bræv, sum landsins lóggevarar senda hvørjum nýføðingi:

"Vælkomið, lítla barn. Tú hevur gjørt tað rætta; tú hevur latið teg føða av foreldrum, sum eru gift. Pápi tín hevur eina høga inntøku, og tí hava vit avgjørt at geva honum ein stóran skattalætta, um so er, at mamma tín velur at vera heima hjá tær. Um mamma tín trívist betur við at fara aftur til arbeiðis, og tú fert á dagstovn, so má pápi tín gjalda fullan skatt."

Ella:

"Vælkomið, lítla barn. Tú hevur gjørt ein verri brølara, tá ið tú valdi familju. Foreldur tíni eru ikki gift; og um tey funnu uppá at giftast, so hjálpti tað teimum einki. Tí pápi tín er undir útbúgving, og mamma tín forvinnur ikki so mikið, at hon kann koyra 140.000 av sínari inntøku yvir á hansara. Tú fært onga gleði av nøkrum skattalætta."

Tað sigst, at hesin skattalættin til høgt løntar, giftar menn kostar einar 30 mill. kr. Um meiningin var at geva øllum landsins borgarum somu viðferð og somu valmøguleikar, so kundi væl borið til at býtt hesa upphædd øðrvísi. T.d. kundi hon verið býtt javnt millum øll nýfødd børn, og tey kundu tá øll fingið hesa heilsan:

"Vælkomið, lítla barn. Tú sleppur at vera heima hjá foreldrum tínum tað fyrsta hálva árið; tað tryggjar barnsburðargrunnurin. Og nú fara vit at leggja eina skattafría upphædd omaná, sum ger, at tú kanst vera heima, til tú verður 1 ár. Og ber tað ikki til, so hava vit pláss á dagstovni."

Hendan heilsanin hevði ikki kostað meira enn tær omanfyri. Men inntil hon verður veruleiki, skjóti eg upp, at einsamallir uppihaldarar, sum ikki hava nakran mann at flyta toppin av inntøku síni yvir á, sleppa at lata barnið / børnini verða skattað av helvtini í staðin.

Vikuskifti
Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720,
teldupostur: eirikur@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Eirikur Lindenskov

# – Jeg kan godt li' Stauning…

**Í grein í Politikken 21. juni 1938 greiðir 80 ára gmal Maria Hammer úr Nólsoy frá, hví hon á høgum aldri á fyrsta sinni vitjar Danmark. Greinin nevnist : »Fra Færøerne til København for at se en Elefant«**




*Maria Hammer úr Nólsoy vitjaði í Keypmannahavn stutt fyri kríggið – helst í 1938 og greiddi frá í donskum blað*

En gammel Bondekone, som aldrig har været uden for Færøerne før og aldrig har gaaet í Skole. Fru Maria Hammer fra Nolsø fortæller om sine mærkelige Oplevelser i København

En mærkelig Kvinde sad over for os i Gaar, en jævn færøsk Bondekone med et levende Ansigt, fuldt af spillende Lune af mynter Ironi, af ægte menneskelighed.

Hun har aldrig gaaet i Skole, hun her firs Aar gammel, og nu er hun for første Gang uden for Færøerne. Jeg spurgte Maria Hammer, hvordan hun var kommet ud paa den lange Rejse fra Nolsø til København. Hun svarede:

– Jeg har levet et langt og lykkeligt Liv sammen med andre Færinger paa vor lille Ø, Nolsø, uden for Thorshavn. Jeg er tilfreds med mit Liv, men jeg vilde ikke dø, før jeg havde set Danmark med mine egne Øjne.

– Men hvad sagde deres Mand?

– Det er jo nettop det, sagde Maria Hammer og lo, medens lystige Smilerynker trak sammen i det sunde, brune Ansigt; hver Gang, jeg kom til ham og sagde, jeg vilde rejse, slog han det hen med disse Ord:

– Aarrh, Sludder og Vrøvl.

Saa turde jeg jo ikke rejse. Men for tre Aar siden døde min Mand, og saa tog jeg Mod til mig, overlod Pasningen af mine Køer, Høns og Ænder til andre og rejste herned med Tjaldur. Jeg havde Billet til anden Klasse, men der var ikke Plads, saa rejste jeg paa første. Konerne hjemme paa Nolsø skulde blot ha' set mig.

– De taler udmærket dansk – hvor har De lært det?

– Det har jeg lært mig selv. Jeg har aldrig gaaet i Skole. Da min Mor var Konfirmeret, blev Skolen nedlagt og den kom først igen, da min egen Datter var voksen. Saa jeg maate lære mig selv alt. Jeg har lært mig selv at læse og skrive Dansk gennem de danske Læger og andre Embedsmænd, jeg i Aarenes Løb er kommet i Forbindelse med. Det er ikke saa faa. Jeg er en Slags klog Kone paa Nolsø.

– Hvordan?

– Ja, jeg er da hverken tosset eller Kvaksalver. Min Mand var Odelsbonde, og medens han drev Bedriften, det var halvanden Mark Jord, var jeg Jordemoder og Apoteker for de 300 Sjæle paa Nolsø, jeg havde Udsalg fra Thorshavn Apotek. Jeg var nu ikke Jordemoder af Uddannelse. Alligevel ordnede jeg alene 12 Fødsler og bistod ved 160 andre. Bare man er rask paa Hænderne, saa gør det ikke saa meget, at man ikke har læst.

### Jeg ka' ikke fordrage Pickles

– Hvad har De saa oplevet paa denne Rejse til Danmark?

– Jeg har faaet saa meget at spise, som jeg aldrig har smagt før. Om Bord paa Tjaldur fik jeg noget modbydeligt surt og bes noget, som jeg ikki ku' fordrage – men man sagde, det var Pickles. Det ku' jeg ikke li'. Men Agurkesalaten! Jeg spiste saa meget andet dejligt, jeg aldrig havde smagt før.

Maria Hammer sad over for os uden et eneste graat Haar, hendes Haar er endnu kulsort som i de unge Dage, skønt hun er blevet 80 Aar gammel. Københavnske Venner tog imod hende ved Baaden, og da hun for første Gang i sit Liv saa en Sporvogn, spurgte hun kort:

– Hvad er det for en Tingest?

– Det er en Sporvogn – Linje 10.

– Naa!

– Er der ikke noget hernede, som overrasker Dem? spurgte vi den gamle Bondekone.

– Jeg er ikke imponeret af noget. Jeg kan ikke forstaa, at de kalder Bispebjerg for er Bjerg. jeg har været paa det højeste Fjeld paa Færøerne, Slattarafjeld, og jeg var 880 Meter oppe over Havet, Det er et Bjerg. jeg var mellem 60 - 70, da jeg sammen med andre klavrede øverst op. Det var trættende. Solen skinnede, men aldrig har jeg drukket saa koldt Vand som af en Kilde langs med Stien op til Toppen. Allerøverst oppe var der ikke et grønt Straa. Der var saa klodt, saa koldt.

### Ikke bange for de brølende løver

– Men var der ikke noget særligt, De gerne vilde se i Danmark?

Da smilte den 80 aarige undseligt og sagde:

– De ler vist ad mig, men jeg vilde saa gerne se en levende Elefant. Det har jeg ønsket hele mit Liv, siden jag var en lille Pige og saa et Billede af en Elefant i et dansk illustreret Blad. Inden jeg rejste, sagde alle til mig, at jeg vilde blive bange, naar Løverne brølede i Zoologisk Have. Men det var slet ikki uhyggeligt at høre dem brøle. Det gør de gale fyre da ogsaa derhjemme.

– Hvad syntes De saa om Elefanten?

– Den var dejlig. Og Flodhesten. Tænk, at der virkelig lever saadanne Dyr. Man gaar jo hjemme i Nolsø og tror, at det er Løgn altsammen.

– Har De kørt med vore Tog?

– Ikke endnyu, men jeg har kørt to Gange med Bil, og jeg sad hver Gang foran hos Chaufføren.

### Den gamle Kone bliver bestyrtet

– De er stedse paa Farten?

– Jeg skal jo se mest muligt i disse fjorten Dage. Forleden Aften var vi i Cirkus – aah, hvor jeg morede mig. Der var en lille Klovn, han lignede grangiveligt Skolelæreren hjemme i Nolsø. Jeg maatte holde mig for Munden, for at han ikke skulde tro, at jeg sad og grinede ham lige op i hans aabne Ansigt.

– Er der intet, som har overrasket Dem?

– Jo, jeg forstaar ikke, at Fiskehandlerne i København er saa frække, at de tager en Krone og halvfems Øre for to smaa Rødspætter, dem faar vi hjemme i Nolsø for 10 Øre i alt – hvis vi da ikke smider dem væk. Vifaar fem store, dejlige Rødspætter for 50 Øre.

– Fiskerne tager dem jo ogsaa lige op af Havet og sælger dem fra Baaden...

– De maa langt bort for at fiske dem, op til Grønland eller Island. Der er ingen Fisk uden om Færøerne mere, dem har de engelske Trawlere taget...

– De har jo Inspektionsskibet Beskytteren til at beskytte Fangsten i de færøske Farvande?

– Fanden i Vold med Beskytteren. Naar han kommer til Stede, er Trawlerne altid for længst væk…

### Københavnerne er go'e nok

– Hvad synes De saa om os?

– Jeg ka' godt li Københavnerne, men sikke Svæklinge, I er. Men ellers ka' jeg godt li' jer, ogsaa jeres Tyre ude paa Bellahøj. De saa saa milde ud i Øjnene, slet ikke gale og vilde som vore egne.

– Saa er De ikke Danskerhader?

– Ah, dette Danskæderi, det er noget dumt Vrøvl. Vi skal lære at forstaa hinanden, ikke at slaas. Vi maa lære at fatte, at ingen af os er enten-eller, men baade-og.

– Hvad synes De om Johannes Patursson, der helst vilde slagte os alle?

– Han er noget forskruet til Tider, men god nok til andre. Han skal lære at forstaa, at Københavnerner er flinke nok. Jeg synes ogsaa godt om Stauning – med det Skæg. Det er næsten lige saa flot som min afdøde Mands.

*Finn.*



# Kvívíkingar minnast Jóan Petur uppi í Trøð

**Samtíðin hevði ikki stóra virðing fyri J. P. Gregoriussen ella Jóan Peturi uppi í Trøð sum hann varð nevndur, men eftirtíðin minnist hann við hátíðarhaldi 2. hvítusunnudag, nú 100 ár eru liðin síðani hann doyði**

HÁTÍÐARHALD
*Turið Kjølbro*



*Gomul mynd av Jóan Petur uppi í Trøð*

Í ár eru 100 ár síðani ein av okkara merkismonnum J. P. Gregoriussen ella Jóan Petur uppi í Trøð sum hann varð nevndur á mannamunni andaðist. Í hesum sambandi skipa kvívíkingar og skyldfólk hansara fyri hátíðarhaldi, fólkafundi og myndaframsýning í Kvívík annan hvítusunnudag. Byrjað verður við gudstænastu, har Marjun Bæk prædikar. Klokkan 13.30 letur myndaframsýning upp í Glæmuni við myndum, sum Jóan Petur uppi í Trøð hevur tikið av fólki, bygda- og landslagi í Kvívík.

- Hann tók eina ørgrynnu av myndum seinnu árini, hann livdi, og tað hevur eydnast at viðgjørt hesar við nýtímans tøkni soleiðis at tær í dag eru rættiliga góðar, sigur Heini Holm, borgarstjóri í Kvívík.

- Tað var rættiliga sjáldsamt tá á døgum, at fólk tóku myndir. Men Jóan Petur uppi í Trøð legði eftir seg eitt stórt og forkunnugt savn av myndum, sigur J.P. Gregoriussen, bróðursonur Jóan Petur uppi í Trøð og stigtakari til hátíðarhaldið.

Fyri hálvt hundrað árum síðani reistu fólk minnisvarða yvir Jóan Petur uppi í Trøð, sum Janus Kamban hevur gjørt, og á hesum staði verður skipað fyri fólkafundi kl. 15.00. Heini Holm býður vælkomin, Eyðun Andreasen, fólkalívsfrøðingur sigur nøkur orð um skaldskapin hjá Jóan Peturi, og Jógvan Durhuus og Høgni Hoydal halda røðu. Eisini fer Jákup Pauli Nielsen, skyldmaður Jóan Petur, at røða um ættina hjá Jóan Peturi uppi í Trøð. Um kvøldið verður føroyskur dansur, sum Norðstreymoyar Dansifelag skipar fyri.

Jóan Petur uppi í Trøð var føddur í Kvívík 1. juni 1845. Tíðliga sást, at hann hevði góð evni, ógvuliga næmur var hann og hevði sera góðan hug at lesa. Hann las alt hann fekk hendur á, skrivar M. A. Jacobsen í formæli í bókini við yrkingum eftir Jóan Petur uppi í Trøð. Nógvi lesnaðurin og góða sambandið við V. U. Hammershaimb, ið var prestur í Kvívík og vinmaður pápa Jóan Peturs, tendraði í sál hansara ein alskur til føroyskt mál og mentunarlív. Tjóðskaparmaður var hann um ein háls og íðin limur í Føringafelag.

- Jóan Petur var nógvar túrar í Kirkjubø saman við pápa sínum, gamla Grækarisi, og haðani hevur hann fingið íblástur. Hann fóðraði tjóðskaparrørsluna við sangum, og boðskapurin í teim flestu sangunum er at fáa føroyska málið til sín rætt, sigur J.P. Gregoriussen.

Sum ungur var Jóan Petur nakrar túrar til skips. Eitt sindur av jørð átti hann, frálíkur træ-, jarn- og bátasmiður var hann eisini, og eftir at hava roynt sjólívið, var hann verandi í Kvívík.

- Hann var ein framúr handverkari. Dreyilagið, hann brúkti, er framvegis til. Hann hevur gjørt tvey arbeiði í Sørvágs kirkju, eitt nú knapparnar, sum eru á stólunum. Eisini hevur hann gjørt fittar barnastólar, greiðir J. P. Gregoriussen frá.

Tókst hann ikki við handaligt arbeiði, sat hann inni og las og skrivaði. Í seinnu helvt av 19. øld tóku fólk stig til at gera eina bók um føroyska landalæru, sum ongantíð kom út á prenti. Jóan Petur uppi í Trøð skrivaði um Norðstreymoy á føroyskum. Hinir partarnir vórðu skrivaðir á donskum. Greinir skrivaði hann til føroysk bløð, og í holt fór hann at yrkja, kvæði og fosturlandssangir, sum hann sendi Fuglaframa og Føringatíðindi. Nógvar sangir yrkti hann til fólkafundir, kendasti er uttan iva "Við Kaspiska havið". Av táttum og kvæðum kunnu vit nevna "Gentukæti" og "Waagen" og "Tróndur og Sigmundur á Havnartingi. Eisini yrkti hann føroysku brúðarvísuna. Hann tókst eisini við annað bókmentaligt arbeiði og týddi nógv úr øðrum málum. Meginparturin, hann hevur yrkt, er savnað í "Yrkingar", ið felagið Varðin gav út í 1928.

Samtíðin hevði ikki stóra virðing fyri fólki, ið hevði góðan hug til lesnað og fyri andligum gripum. Alt, ið ikki var beinleiðis til nyttu, var vanvirt. Tí hildu samtíðarfólk hansara ikki nógv um skriving hansara og áhaldandi stríð hansara fyri føroyska málinum.

- Kvívíkingar eru ernir av honum í dag, og børnini í Kvívík vita, hvør hann var, sigur Heini Holm.

Heilsuveikur skrivaði Jóan Petur uppi í Trøð hetta ørindið, sum hann sendi Fuglaframa stutt áðrenn hann doyði: "Jóan heilsar tykkum øllum somlum, dreingjum, gentum, ungum monnum, gomlum. Hann sjálvur heima liggur, tað fellur honum tungt, hann pennin bara tyggur, men blóðið rennur ungt. Føroya mál fáið upp at liva! Føroya mál biðji eg øll skriva. Føroyamál!"

Jóan Petur uppi í Trøð giftist í 1873 við Jóhonnu, ættað úr Kvívík. Hon doyði í 1895, tey áttu eingi børn. Jóan Petur andaðist í 1901, bert 56 ára gamal.



*Bygdin Kvívík síðst í 19. øld. Jóan Petur uppi í Trøð hevur myndatikið*



*Heini Holm, borgarstjóri í Kvíkvík avmyndaður frammanfyri standmynd av Jóan Petur uppi í Trøð, sum Janus Kamban gjørdi í 1951. Mynd: Jens Kristian Vang*